# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 09.04.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Martin í Nesi
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-14-2024: Kommunusamanlegging – tilmæli um ”Vegleiðandi fólkaatkvøðu”.**

Arbeiðsbólkurin, ið hevur kannað "fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging" hevði framløgu fyri kommunustýrislimum og skrivarum á Seglloftinum tann 18.03.2024, har mælt varð til at hava borgarafundir á Tvøroyri, Hvalba og Fámjin.
Hetta varð samtykt av fundarluttakarunum og vórðu fundir hildnir tann 19.03. í Hvalba, 20.03. á Tvøroyri og 21.03. í Fámjin.
Janus Thomsen, borgarstjóri mælir bygdarráðnum til at taka álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging í norðaru helvt av Suðuroy til eftirtektar og at heita á arbeiðsbólkin um at fyrireika uppskot til fólkaatkvøðu í Hvalbiar Kommunu, ið síðani verður lagt fyri bygdarráðið til støðutakan.

**Avgerð:**

Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegg-ging og heita á arbeiðsbólkin um at arbeiða víðari við at gera uppskot og tilfar klárt í sambandi við fólkaatkvøðuna. Ronni Hammer, Thorstein Thomsen og Poul Laust Christiansen tóku ikki undir við hesum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 17.30.

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson Eir J. Norðberg

Martin í Nesi Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen